


# Ráðstevna um ADHD og arbeiðsmarknaðin.



***WHO og norðurlendsk tøl vísa, at umleið 2,5% av vaksnum hava ADHD. Í Føroyum eru gott 31.000 fólk í aldrinum 18-67 ár. 2,5% av teimum eru uml. 800 fólk. Í Føroyum er mett, at undir 300 vaksin hava fingið staðfest ADHD.***
***- Tað merkir, at fleiri enn 500 fólk mangla at verða funnin og hjálpt.***

Góðu fakfólk!
ADHD-felagið kastar nú ljós á vaksin við ADHD.
At vaksin fáa staðfest ADHD er relativt nýtt í Føroyum, og enn hava sera fá fingið diagnosina ímun til londini rundanum okkum.

ADHD forklárar avbjóðingarnar hjá tí einstaka, og gevur ikki einans henni ella honum ADHD amboðini, men eisini familjuni, starvsfeløgum og fakfólkum.
Saman við viðgerð, ráðgeving og tillagingum ber til at tryggja tí einstaka eitt gott og langt arbeiðslív.

Hendan ráðstevnan, skal verða við til at lata fakfólk betri í til at skilja, eyðmerkja og hjálpa fólkum við ADHD, sum eru ella koma í almennu skipaninar og ungum, ið tørva hjálp at koma á arbeiðsmarknaðin.

Vit ynskja eisini at skapa eitt netverk millum feløg, stovnar, ráð og luttakandi fakfólk. Vit vóna, at tit vilja verða við til at skráleggja økið, skipanirnar og arbeiðsøkini. At tit vilja kasta í kjakið og saman gera eina yvirlýsing, sum skal verða við til at betra og tryggja arbeiðslívið hjá arbeiðstakarum við ADHD.

Vit bjóða til almenna ráðstevnu fyri fakfólkum s.s. sosialráðgevum, vegleiðarum, kveikjarum, sjúkrarøktarfrøðingum, psykologum, starvsfólkum í almennu fyrisitingini v.m.

**Ráðstevna um ADHD og arbeiðsmarknað fyri fakfólk.**
**Nær:** 24.januar kl. 8.15-14.00
**Fyriskipari:** ADHD-felagið
**Hvar:** MEGD-húsið, Íslandsvegnum 10C, Tórshavn.
**Fyrilestrarhaldari:** Tine Hedegaard, Programleder på voksenområdet í donsku ADHD-foreningen.
**Kostnaður:** 1500kr (íroknað morgunmat, kaffi+døgurða)
**Tilmeldingarfreist:** 22.januar
*! Avmarkað pláss*

**Melda til við at skriva teldupost til adhd@adhd.fo við navni, starvsheiti og arbeiðsplássi og rinda 1500kr á konto í Betri 9181 4440120 (viðmerk navn/stovn)**

Skrá:
**8.15-8.45** Morgunmatur
**8.45-9.15** Forkvinnan bjóðar vælkomin. Luttakandi stovnar presentera seg stutt 3-5 min. hvør.
**9.15 -10.05** Tina Hedegaard: *Fyrilestur "Hvussu vísir ADHD seg hjá vaksnum, hvussu eyðkenna vit ADHD hjá vaksnum og hvørjar eru avbjóðingarnar?*
**10.05-10.25** Persónlig søga 1
**10.25-11.15** Tina Hedegaard: Fyrilestur "*Hvussu kunna vit tryggja eitt gott og langt arbeiðslív*"
**11.15-11.25** Persónlig søga 2
**11.25-12.00** Døgurði
**12.00-12.45** Luttakarnir verða býttir upp í bólkar og verða settir 2-3 spurningar at kjakast um.
**12.45-13.30** Bólkaframløga og kjak av spurningunum
**13-30-14.00** Gera eina felagsyvirlýsing við 3 punktum.

Eru spurningar, vinarliga ringið 211428 ella skriva.

Vinarliga

Bjørg Dam
Forkvinna í ADHD-felagnum
Tlf 211428